# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Framvegis óstøðugir marknaðir

Tað er framvegis órógv á marknaðunum í heiminum. Partabrævamarknaðirnir sveiggja serstakliga nógv í hesum døgum. Sjálvt fíggjarliga sterk feløg eru hoyknað undan byrðuni og eru farin av knóranum. Tað er ikki long tíð síðani, at nógv hildu, at nú var botnurin náddur, og so hava síðstu vikurnar víst, at nógv var eftir. Í verandi stund er sera trupult at vita, hvat endaliga útfallið verður.

Tey flestu eru tó samd í, at búskaparligi vøksturin í heiminum verður væl lægri enn mett, fyri ikki so langari tíð síðani. Hetta hevur aftur við sær, at eftirspurningurin eftir olju minkar og harvið prísurin. Hesi útlitini hava eisini verið við til eitt sera stórt prísfall á oljuni siðstu vikurnar. Oljan verður í dag handlað til undir 80 dollarar fyri tunnuna. Tað eru ikki nógvir mánaðir síðani - juli mánaði í ár – at vit sóu, at oljuprísurin var uppi á 147 dollarum. Bara fallið í oljuprísinum síðstu vikuna er tað størsta fallið í eina viku síðstu 4 árini. Óttin fyri tí fíggjarligu støðuni og fallandi vøkstur í heimsbúskapinum sigst verða orsøkin. OPEC hevur kallað inn til kreppufund í Wien í novembur at viðgera støðuna. Í tíðindaskrivi sigur OPEC, at á fundinum skulu tey viðgera fíggjarkreppuna, heimsbúskapin og ávirkanina á oljumarknaðin.

Vit kunnu bara staðfesta, at tað er sera skjótt hvønn vegin í hesum døgum, og trupult er at meta um framtíðarútlitini. Tað er ikki langt síðani, at man helt, at tey oljuframleiðandi londini sótu við buktini í báðum endum, men heimsbúskapurin er so samantengdur, at nú kallar enntá OPEC inn til kreppufund.

Sum fiskivinnutjóð vita vit, at oljuprísirnir hava sera stóra ávirkan á føroyska samfelagið. So í øllum meldrinum kann hetta við einum fallandi oljuprísi hava positiva ávirkan á tað føroyska samfelagið. Vit vita, at oljuprísirnir eru sera tyngjandi fyri føroysku fiskivinnuna í løtuni. Eisini vanligi forbrúkarin hevur merkt nógv til tann hækkandi oljuprísin. Oljan verður handlað í dollarunum, og dollarin er nakað styrknaður, og tað dregur so hinvegin. Men kanska fara vit á hesum øki at merkja eina vend nú, soleiðis at tað fær jaliga ávirkan í samfelagnum.

**Sosialurin**

## Vit gróvu tærnar niður í gólvpláturnar á Christiansborg



**EDMUND JOENSEN**
løgtings- og fólkatingsmaður

**Sama dag, sum Fólkatingið tryggjar bankar og kundar í Føroyum og setur sítt kredittvirðið til taks hjá øllum í ríkinum, stendur ein føroyingur og ilskast inn á búskaparligar hóttanir úr Danmark**

Ríkisfelagsskapurin hevur enn eina ferð víst sín stóra fyrimun fyri hvønn einstakan borgara í Føroyum.

Hetta hendi fríggjadagin 10. oktober, tá eitt statsgaranterað trygdarnet varð spent út undir allar bankar í ríkinum – eisini teir føroysku og grønlendsku bankarnar.

**Óavmarkað trygd fyri innistandandi**

Ítøkiliga ber trygdarnetið m.a. í sær, at tann sonevnda innskjótaratrygdin nú er óavmarkað.

Tað merkir, at allir uppspararar í Føroyum sleppa undan at stúra fyri sínum innistandandi pengi. Skuldi tað ringasta hent, og bankin noyðist at lata aftur, ja so ført tú allan tín innistandandi pening aftur frá danska statinum.

Frammanundan steðgaði vanliga innskjótaratrygdin við 300.000 krónur. Tað, sum lá oman fyri hesa upphædd, fekst ikki aftur. Nú er innskjótaratrygdin óavmarkað.

Sostatt er munandi tryggari at vera uppsparari nú enn frammanundan, og tað er sera positivt mitt í meldrinum, ið altjóða fíggjarkreppan skapar.

**Hjálp til bankarnar**

Hin positivi týdningurin av tí sonevnda hjálparpakkanum hjá donsku stjórnini er, at bankar – eisini teir føroysku – nú kunnu kenna seg tryggari í at lána hvørjum øðrum pengar.

Hetta er avgerandi, tí kreppan er eisini ein álitiskreppa, har bankar ikki tora at lána hvørjum øðrum pengar av ótta fyri at missa pengarnar.

Harumframt hevur danski Tjóðbankin, sum partur av hjálparpakkanum, sett pening av til bankar at lána – undir ávísum treytum, sjálvsagt.

Prinsippið í hjálparpakkanum er, at staturin kemur til hjálpar, tá og um tær 35 milliardir krónurnar, ið bankarnir leggja í ein felags grunn, eru uppi.

Hjálparpakkin, ið sum kunnugt eisini umfatar bankar og bankakundar í Føroyum, prógvar eina ferð enn, at samanhaldið í Ríkisfelagsskapinum er gott. Danski staturin setur sítt trúvirði og – ikki minst – sítt kredittvirði til taks, og hesum njóta vit gott av í øllum felagsskapinum.

**Ætlaðu at yvirtaka fíggjarøkið**

Akkurát nú – tá vit øll fegnast um trygdina, ið vit fáa lut í – er rætt at minna okkum sjálvi á, hvat ávísir føroyskir politikarar søgdu fyri bert sjey mánaðum síðani. Politiska minnið er jú so ómetaliga stutt.

Júst í mars mánaði var eitt rættiliga heitt orðaskifti í Føroyum um vandamestu yvirtøkuætlanina hjá CHE-samgonguni. CHE ætlaði at yvirtaka alt fíggjarøkið, herundir fíggjareftirlitið, og harvið taka okkum burtur úr tryggu skipanini, sum er galdandi innan Ríkisfelagsskapin.

Sambandsflokkurin ávaraðu staðiliga ímóti ætlaðu yvirtøkuni, ið hótti trúvirðið og tryggleikan hjá bankunum, og hon var eisini vandamikil fyri áðurnevndu innskjótaratrygd. Hinumegin stjóðu Tjóðveldi, Miðflokkurin og Javnaðarflokkurin, ið vildu hava yvirtøkuna framda.

Júst tann 13. mars var táverandi løgmaður, Jóannes Eidesgaard, í bløðunum við einum lesarabrævi og vardi ætlaðu yvirtøkuna. Tey, sum leggja í, kunnu rógva aftur á aftur lesarabrævið, har táverandi løgmaður mælti til at yvirtaka fíggjarøkið.

So frægir men sum Kjartan Hoydal og skyldmaðurin Zacharias Wang vóru eisini alment úti og talaðu fyri at yvirtaka fíggjarøkið. Sama gjørdu táverandi landsstýrismenninir, Høgni Hoydal og Karsten Hansen.

**Hvat hevði hent?**

Lat okkum spyrja: Hvussu hevði standurin verið í Føroyum í dag, um CHE-fólkini fingu stundir at gera álvara av ørvitisyvirtøkuni?

Ja, eg tori ikki at hugsa mær tey ringastu dømini. Tey síggja vit í Íslandi nú um dagarnar. So vítt hevði neyvan komið her hjá okkum.

Men tað stendur rimmar fast, at um CHE-flokkarnir høvdu fingið sín vilja, hevði onki trygdarnet verið undir føroyskum bankum. Teir høvdu verið noyddir at siglt sín egna sjógv í hesum ófatiliga hørðu tíðum á fíggjarmarknaðunum.

Innskjótaratrygdin hevði verið sera ivasom, tí ongin føroyskur kassi – hvørki landskassin ella Landsbankin – er mentur at tryggja innlánini í føroysku bankunum. Harvið høvdu eisini bankakundarnir staðið ótryggir í einari heimsfevnandi fíggjarkreppu.

**Tosið er tagnað**

Í dag hoyrist onki til teirra, sum í mars ætlaðu at yvirtaka fíggjarøkið. Tey fegnast uttan iva um, at bankarnir eru tryggjaðir. Og tey kunnu sova róliga um náttina í vissuni um, at innistandandi stendur trygt í bankanum.

Tosið um yvirtøkuna er tagnað, og øll taka undir við hjálparpakkanum hjá donsku stjórnini.

Nýggja ABC-samgongan hevur tíbetur onnur og meira týðandi mál á skránni enn at yvirtaka fíggjarøkið.

Tá vit fríggjadagin atkvøddu hjálparpakkan ígjøgnum í Fólkatinginum, atkvøddu báðir teir føroysku fólkatingslimirnir fyri. Sjálvur trýsti eg á jaknøttin, og tað sama gjørdi umboðið hjá Tjóðveldi. Í somu løtu andaðu bankar og bankakundar í øllum ríkinum lættan.

Nakað seini fór Annita á Fríðriksmørk fyri Tjóðveldi á røðarapallin, og flest øll, ið vóru til staðar, høvdu hug at grava tærnar niður ígjøgnum gólvpláturnar, tá hesi orðini fullu:

"Búskaparligar hóttanir úr Danmark eru við til at forða fyri fullveldinum".

Álvaratos. Sama dag, sum Fólkatingið tryggjar bankar og kundar í Føroyum, stendur ein føroyingur og ilskast inn á búskaparligar hóttanir úr Danmark.

Fyri summum er ongin vón.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo
Bergur Johannesen bergur@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.